# Ongin uppílegging í bræði

**Tað kemur ikki upp á tal, at politiski myndugleikin leggur upp í verkfalli. Í øllum førum ikki enn. Tað sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum hevur bæði vinnumál og arbeiðsmarknaðarmál undir sær.**

VERKFALL
*Ingi Rasmussen*



Verkfall er, og tað er so langt millum partarnar, at onki røkist fyri einari semju.

Seinasta uppskotið frá semingsmonnunum var ein lønarhækking á 3,20 krónur um árið. Arbeiðarafeløgini siga 8,20 krónur um árið. Sostatt er vandin fyri einum langum verkfalli stórur.

Tað merkir, at vinnan í Føroyum bløðir. Bjarni Djurholm er landsstýrismaður við vinnumálum og skal syrgja fyri, at vinnan í Føroyum hevur best møgulig kor. Hann er eisini landsstýrismaður við arbeiðsmarknaðarmálum og skal síggja til, at arbeiðsmarknaðurin hevur tað gott. Hann sær onga orsøk til, at politiski myndugleikin sparir landinum pening við at leggja út í eitt verkfall.

– Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava nøkur rættindi og nakrar skyldur til at gera sáttamála sínámillum. At vera ósamdir er ein partur av rættindunum og eitt stig fram á leiðini at vinna sær góðar sømdir. Politikarar eiga at halda seg langt burtur, so leingi sum til ber, sigur Bjarni Djurholm.

Hinvegin er eitt mark fyri, hvat landið tolir, sigur hann. Hvar tað markið gongur, dugir hann ikki siga. Men greitt er, at eitt verkfall kostar pengar. Serliga hjá framleiðsluvinnuni, har tíð eru pengar, og avtalur verða forsømdar.

– Vit hava ongar útrokningar fyri, hvat eitt verkfall, ið er so umfatandi sum hetta, kostar. Men tað kostar, tað vita vit. Tað er sjálvandi spell, men tað er ivasamt, um vit kunnu gera nakað, sigur Bjarni Djurholm.

Verkfall er vorðin ein afturvendandi táttur í Føroyum, og tað harmast landsstýrismaðurin um.

– Samanborið við tey lond, sum vit vanliga samanbera okkum við, so hava vit rættiliga ofta verkfall í Føroyum. Hvørki fyri vinnuna ella fyri trivnaðin á arbeiðsmarknaðinum. Tað er ikki á øllum økjum, at verkfall er ofta, so tað kann valdast um, hvørjir persónar samráðast, sigur Bjarni Djurholm.

Sjálvur harmast Bjarni Djurholm um, at tað ikki hjálpti fyri samráðingarnar, at samgongan hevur veitt ein munadyggan skattalætta.

– Eg kann bara staðfesta, at arbeiðarafeløgini ikki halda, at skattalættin lættir stórvegis um hjá teimum. Eftir mínum tykki kundi hann eisini verið størri, tí tað hevði bæði ført til reallønarvøkstur og betri kappingarføri, sigur Bjarni Djurholm.

# Ónøgd við semingsmenninar

**Arbeiðarafeløgini eru misnøgd við semingsmenninar og møguleikin at klagað, hevur eisini verið nevndur**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Semingsmaðurin er bæði partískur og kanska er hann eisini ógegnigur.

Tað halda arbeiðarafeløgini.

Tey eru avbera misnøgd við leiklutin hjá semingsmonnunum, Misnøgdin er so stór, at at tað ljóðar, at tey enntá hava umhugsað at klaga hann fyri vinnumálaráðnum, hevur eisini verið nevndur.

Men tað hevði Ingeborg Vinther onga viðmerking á gjáramorgunin.

Hon váttar tó, at tey eru stak ónøgd við leiklutin hjá semingsstovninum.

– Semingsmaðurin oyðilegði stemningin við samráðingarborðið beinanvegin.

– Tað fyrsta hann ætlaði var at útseta samráðingarnar, tí hann skuldi til Danmarkar.

– Tá ið vit noktaðu, ætlaði hann at stongja okkum inni til samráðingar sjálvan fyrsta mai, sum er altjóða arbeiðaradagur.

Ingeborg Vinther sigur, at fakfeløgini søgu bums nei.Vit sótu ikki inni 1. mai og samráddust, sama hvørjar avleiðingar tað fór at fáa.

– Dagin eftir endaði tað við, at semingsmaðurin bað um umbering. Men tá varð tann góði stemningurin longu farin.

– Tað næsta var, at semingsmaðurin var í øðini um, at formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelagi í sjónvarpinum hevði víst á, at Karsten Hansen hevði lagt seg út í samráðingarnar og at endamálið var var minka munin ímillum lág- og háinntøkur.

Inbgeborg Vinther sigur, at avtalan við semingsstovnin var at ongin skuldi siga nakað alment um sjálvar semingsroyndirnar. Men vit far altíð at krevja okkara rætt at siga okkara hugsan um viðurskifti, sum ikki hava við semingina at gera.

Ingeborg Vinther sigur, at tað var ógvuliga trupult at koma til eina semju við hasum semingsmonnunum, tí teir løgdu frá fyrsta degi upp til stríð við arbeiðarafeløgini.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, er púra samdur við Ingeborg Vinther.

– Tað er týðiligt, at semingsmaðurin hellur arbeiðsgevaravegin og tað hava vit verið sera misnøgd við, sigur hann.

### Ógegnigur

Arbeiðarafeløgini kanna nú eisini eftir um semingsmaðurin, Suni Schwartz Jacobsen er beinleiðis ógegigur.

Hann er grannskoðari hjá KPMG, sum eisini er grannskoðari hjá Arbeiðsgevarafelagnum.

– Er hann ógegnigur, verður tað als ikki góðtikið, sigur Ingeborg Vinther. Hon sigur, at arbeiðarafeløgini ætla at kanan málið.

Jan Mortensen á arbeiðsgevarafelagnum váttar, at KPMG er grannkoðari hjá arbeiðsgevarafelagnum, men tað er ikki Suni Schwarts Jacobsen, sum grannskoðar roknskapin, tað er ein annar grannskoðari.

Annars heldur hann, at tað er lætt at vera eftirklókur, tí eisini arbeiðarafeløgini hava verið við til at útnevna Suna Schwartz Jacobsen til semingsmann og hava góðtikið hann.

– Semingsmenninir hava eina ógvuliga trupla uppgávu og tað er ongin orsøk til at finnast at teimum, sigur Jan Mortensen.

### Vita til eina aðru ferð

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmananfelag, váttar, at tey hava góðkent semingsmenninar.

– Men tá vistu vit ikki av hesum her, sigur hann. Men so vita vit tað til eina aðru ferð, leggur hann afturat.

Síðani hava tey eisini fingið at vita, at KPMG, har Suni Swartz Jacobsen arbeiðir, er grannskoðari hjá bæði Føroya Arbeiðsgevarafelag og fleiri øðrum stórum virkjum, eitt nú stórum fiskavirkjum og tí meta tey, at hann er ógegnigur.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Suna Schwartz Jacobsen, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Føroyskt brak á Fólkatingi

**Nú skulu hernaðarlógirnar, sum vóru settar í gildi fyri Føroyar, standa sína roynd á Fólkatingi. Eitt samt løgting vil burturbeina lógirnar, sum lýstar beint ímóti føroyskum vilja. Fleiri danskir andstøðuflokkar halda hánt um leiklutin hjá stjórnini**

HERNAÐARLÓGIR
*Ingi Rasmussen*

Mikudagin 14. mai verður buldur og brak á Fólkatingi. Út ímóti kvøldi kemur uppskotið fyri hjá Tórbirni Jacobsen um at avtaka hernaðarligu revsilógirnar fyri Føroyar.

Uppskotið er eitt aftursvar til, at danska stjórnin hevur sett eina røð av hernaðarlógum og fyriskipanum í verk fyri Føroyar beint ímóti løgtingsins vilja. Síðan tá hevur løgtingið eisini einmælt samtykt eitt ríkislógartilmæli um at taka lógirnar av aftur. Sostatt er tað eitt einmælt løgting, ið reisir seg ímóti donsku stjórnini, og fyri einaferð skyld hevur føroyski fólkatingsmaðurin í Norðuratlantsbólkinum allar Føroyar aftan fyri seg.

Uppskotið er stutt og ljóðar soleiðis: »Idet Folketinget anerkender og respekterer, at Færøerne er en selvstændig juridisk enhed, pålægger Folketinget regeringen at tilbagetrække den militære straffelov fra 1973 med senere ændringer, som regeringen uden landsstyrets viden og imod et enigt Lagtings beslutning har bekendtgjort på Færøerne.«

Í grundgevingunum til uppskotið førir Tórbjørn Jacobsen fram, at framferðin hjá donsku stjórnini í hesum máli er ódemokratisk. Víst verður til, at málið tók seg upp, tí føroyingar sjálvir reistu tað. Landsstýrismaðurin við lógarmálum bað upprunaliga um, at gamla hernaðarliga revsilógin, sum loyvdi deyðarevsing í krígstíð, varð tikin av. Samstundis varð áherðsla løgd á, at føroyingar onga lóg nýttust á økinum. Hetta var eisini í samsvari við eina landsstýrissamtykt frá 1991, har føroyingar frábóðu sær at fáa nýggju hernaðarligu revsilógin frá 1973 setta í gildi.

Men danska stjórnin gekk í móti hesum. Ríkisumboðið lýsti eina røð av hernaðarligum lógum fyri Føroyar. Grundgevingin var, at Føroyar sum tann einasti parturin í danska ríkinum ikki kundi liggja í hernaðarligum lógloysi.

Tórbjørn Jacobsen staðfestir í viðmerking til uppskotið, at verða lógirnar ikki tiknar aftur, so hava orðini um tríggir javnbjóðis partar í ríkisfelagsskapinum fingið eitt álvarsligt skot fyri bógvin.

Spennandi verður at fylgja orðaskiftinum í Fólkatinginum, tí fleiri danskir andstøðuflokkar hava funnist harðliga at donsku stjórnini fyri at seta lógina í gildi uttan at spyrja føroyingar eftir. Hetta er annars ein siðvenja, sum hevur verið galdandi líka síðan heimastýrislógin kom í gildi í 1948.

# Uttanríkisráðharrin vitjar løgmann

**Í næstu viku kemur danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, á almenna vitjan í Føroyum. Anfinn Kallsberg løgmaður er vertur.**

VITJAN
*Ingi Rasmussen*

Per Stig Møller kemur í Vágar mánamorgunin 12. mai klokkan 9.50 og fer avstað aftur týsdagin 13. mai klokkan 17. Á stuttu føroyaferðini verða bæði fundir og útferðir.

Mánadagin verður fundur millum løgmann og uttanríkisráðharran í Tinganesi. Síðan verður fundur við landsstýrið og uttanlandsnevndina hjá løgtinginum. Tíðindafundur við løgmanni og uttanríkisráðharranum verður á Løgmansskrivsstovuni eftir fundirnar.

Týsdagurin er settur av til útferðir. Farið verður av Vestmanna til Tjørnuvíkar. Vitjað verður eisini í Haldórsvíkar kirkju, har høvið verður at hoyra Kingosálmar.